gult26 cyan26 magenta26 svart26

Todi basti Jákupi

Síðstu ferð hann hevði møguleikan at skora ímóti Jákupi í Herfølge málinum, eydnaðist tað fyri fyrstu ferð hjá Toda

SUPERLIGA

Jóannes Hansen

Todi Jónsson og Jákup Mikkelsen hava seinastu sjey árini mangan staðið andlit til andlit í bestu donsku fótbóltsdeildini. Jákup hevur vart Herfølge málið, og Todi hevur verið ímillum framrættaðu menninar í Lyngby og síðani í FCK.

Nú er tað bara hálvur annar mánaði, inntil Jákup Mikkelsen verður fyrrverandi Herfølge málverji. Sunnudagin var FCK í Herfølge, og hetta var seinasti møguleikin hjá Toda at skora hjá landsliðsfelaganum og vinmanninum úr Klaksvík. Í øllum teimum undanfarnu dystunum hevði tað eydnast Jákupi at halda tætt, men sunnudagin skoraði Todi.

FCK vann 4–3, og Todi skoraði, tá teir tveir minuttir undan steðginum javnaðu til 2–2. Heine Fernandez var ikki so sjálvsøkin, sum hann ofta verður sagdur at vera, tá hann stútaði upp á tvørs til Toda, sum var púra leysur og hevði lætt við at skora, uttan at Jákup hevði nakran møguleika at bjarga.

Nógv undirhald

4.468 áskoðarar vóru í Herfølge, og teir vóru vitni til mest undirhaldandi uppgerðina í 28. leikumfarinum. Fýra mál komu í 1. hálvleiki og trý í 2. hálvleiki.

Í bløðunum fær Jákup Mikkelsen eitt sjey tal, og FCK málverjin, norski Thomas Myhre, fær eitt átta tal. Tað vil siga, at teir draga eitt frá ellivu fyri hvørt málið, sum fer ígjøgnum. Á sjónvarpsmyndini tóktist Jákup ikki hava møguleika at bjarga nøkrum av teimum fýra málunum. Men hann heldur sjálvur, at hann kanska kundi havt bjargað fyrsta málinum, sum kom, tá eitt korter var farið:

– Talan var um hornaspark, sum kom innfyri ikki so langt frá málinum. Vit hava í sovornum støðum fýra spælarar á linju á fimm metrinum. Kim Madsen, sum stútaði málið, kom ímillum, eftir at bóltur var farin framvið teimum av okkara. Men kanska skuldi eg havt verið úti og havt boksað burtur, heldur Jákup, sum altíð er sera kritiskur ímóti sær sjálvum.

Umframt at Todi Jónsson skoraði til 2–2, so var hann uppi í einum øðrum máli, men tað var í skeiva endanum. Tað restaðu sjey minuttir av fyrra umfarinum, tá dómarin helt, at Todi hevði skumpað Chris Hermansen so mikið illa í ryggin, at tað var neyugt at døma brotsspark. Chris Hermansen javnaði til 1–1, og fýra minuttir undan steðginum sá uppaftur betri út hjá Herfølge. Kenneth Jensen snaraði seg hegnisliga leysan, og sendi bóltin flatt framvið norska leigusveininum í FCK málinum.

Tað var javnt í steðginum, tí Todi hevði skorað eftir 43 minuttir. Í 2. hálvleiki var tað tætt og spennandi, og ikki fyrrenn eftir 70 minuttir kom FCK á odda 3–2. Thomas Thorninger sendi úr vinstru flatt fríspark ímóti málinum. Jeppe Vestergaard royndi at sparka burtur, men bólturin fór ímillum beinini á honum og inn í málið.

Eftir 76 minuttir gjørdi

Myndin her varð tikin, tá Herfølge tók ímóti FCK og eftirfylgjandi fekk handað gullmerkini. Nú er hýrurin tó ein heilt annar hjá meistarunum, sum eru hart kroystir í botninum á stigatalvuni

verjuálitið hjá FCK, Jakob Laursen, brotsspark ímóti Chris Hermansen, sum aftur var tryggur úr ellivu metrum.

Í bløðunum fær Todi eitt níggju tal. Hetta var hægsti karaktururin í Herfølge sunnudagin. Umframt Toda fingu tríggir liðfelagar við honum og fýra leysur og spælarar henda sama karakterin.

Tá tað restaðu tíggju minuttir varð Todi Jónsson útskiftur við Pascal Simpson, og so seks minuttir undan leikloki eydnaðist tað FCK at fáa sigursmálið. Sibusiso Zuma, sum hevði verið væl upplagdur, fekk góða sending, gjørdist leysur og sendi bóltin undir Jákup Mikkelsen.

Toppur og botnur

FCK sigurin í Herfølge hevur við sær, at teir framvegis eru væl fyri í kappingini um DM. Teir eru eitt stig aftanfyri Brøndby, sum á heimavøllinum vann tepurt 4 AGF. Úrslitið var 2–1.

Saman við Brøndby og FCK er tað nú bara Silkeborg, sum er við í stríðnum um DM. Silkeborg skuldi í gjárkvøldið spæla á heimavølli ímóti AaB. Viborg megnaði bara 1–1 ímóti OB, og FCM megnaði bara 0–0 ímóti Lyngby. Bæði Viborg og FCM áttu heimavøll. Tey bæði júsku liðini hava verið drúgv í DM kappingini, men nú tykjast teir meiri ella minni at hava givið skarvin yvir.

AB hevði góðar møguleikar rættuliga at leggja sjógv ímillum seg og Herfølge í stríðnum fyri at sleppa undan niðurflyting. Men teir megnaðu bara 1–1 á heimavølli ímóti niðurflutta Sønderjylland. Harvið økti munurin ímillum Herfølge og AB til fýra stig, men allar síður eru ikki syftar, tí Herfølge fær seinni í mánaðinum vitjan av AB.

29. umfarið í superliguni er á skránni longu hóskvøldið. Tá verður spælt soleiðis: AB–Brøndby, AaB–Viborg, FCK–FCM, Sønderjylland–Silkeborg, Lyngby–AGF og OB–Herfølge.

Óli tætt at málinum

Eftir sigur á útivølli er tað ikki veruleikafjart hjá Hvidovre at rokna við sætta plássinum, sum Peter Schmeichel vildi hava sítt felag at røkka

DANMARK:

Jóannes Hansen

Í Sundby Idrætspark spæla teir altíð fyrrapartin sunnudag. Nú sunnudagin vóru tað Óli Johannesen og Hvidovre, sum vitjaðu Fremad Amager. 915 áskoðarar møttu, og teir sóu Hvidovre vinna 2–0 ímóti heimaliðnum, sum onkuntíð hevur sæð betri dagar, enn teir gera nú. Fremad Amager er í stórum niðurflytingarvanda.

Málini komu miðskeiðis í 2. hálvleiki. Hvidovre skoraði í 66. og í 67. minutti, og Óli Johannesen eigur enn til góða at skora fyri nýggja felagið hjá sær.

Tá Peter Schmeichel keypti seg inn í Hvidovre, segði hann, at málið var at røkka bestu deildini. Hann helt tað vera veruleikafjart at rokna við uppflyting í ár, men hann metti tað ikki at vera av leið at røkka sætta plássinum. Eftir sigurin á Amager sunnumorgunin er Hvidovre á sjeynda plássinum. Tað er tætt undir Hvidovre, meðan tað eru fýra stig upp til sætta plássið.

Eitt av liðunum omanfyri Hvidovre er Farum, sum sera fegið vil upp í bestu deildina. Peter Brixtofte, borgarstjórin í Farum, stendur á odda fyri liðnum, sum heilt víst ætlar sær at flyta upp komandi ár. Tað sæst m. a. í, at teir hava keypt fleiri spælarar úr bestu deildini.

Fríggjakvøldið fær Hvidovre vitjan av Farum, sum í løtuni er á fimta plássi.

Á sætta plássinum, sum Hvidovre ætlar sær, er gamla stórfelagið í Eysturbrúgv í Keypmannahavn, B93. Har tykist tað kortini ikki ganga nakað serligt. Um vikuskiftið sóu 301 áskoðarar B93 tapa á heimavølli 2–1 ímóti Skive, sum ongantíð hevur gjørt nakað serligt um seg, og sum í løtuni er niðarlaga á støðutalvuni.

Sunnudagin stýrkti gamla meistarafelagið, Esbjerg, nógv um sína støðu í stríðnum um uppflyting. Størstu kappingina fáa teir frá Frem. Sunnudagin hittust hesi bæði liðini á heimavøllinum hjá Frem í Valby. Esbjerg vann 2–1, og harvið bendir nógv á, at steðgurin hjá Esbjerg í næstbestu deildini í hesum sinni bara verður eitt ár..

Tað eru fimm umfør eftir at spæla, og umframt Esbjerg og Frem mugu Køge og Vejle roknast sum møgulig evni til uppflyting. Vejle gjørdi sína skyldu, tá teir vunnu 3–0 á heimavølli ímóti FC Aarhus, sum er í stórum niðurflytingarvanda.

Hjá Køge gekk munin lakari. Teir taptu á heimavølli 2–0 ímóti Randers Freja, sum Atli Gregersen er knýttur at.

gult27 cyan27 magenta27 svart27

Kurt úti í kuldanum

Kurt Mørkøre tykist í løtuni at hava fingið fast pláss á beinkinum hjá Sogndal, men við strævnu dystarskránni í huga, er ikki óhugsandi, at hann skjótt fer at fáa møguleikan aftur

Ósigurin á heimavølli ímóti toppliðnum úr Stavanger var ikki í tráð við spælbýti og møguleikarnar, heldur Julian Johnsson, sum komandi mánadag aftur fer at venja saman við liðfeløgunum

TIPPELIGA

Jóannes Hansen

Fótbóltslagið í Sogndal var ikki gott sunnukvøldið. Oddaliðið Viking úr Stavanger var og vitjaði, og teir fóru til hús aftur við øllum stigunum. Teir vunnu 1–0, og málið fingu teir, tá tað restaðu átta minuttir. Skiftisspælarin Ben Wright hevði bara verið á vøllinum í einar tríggjar minuttir, tá hann stútaði sigursmálið.

– Vit vóru sera hepnir at vinna, staðfesti venjarin hjá Viking Stavanger. Hann eitur Benny Lennartsson. Fótbóltsáhugaðir føroyingar eiga at komast við navnið. Hann var eitt skifti venjari í Lyngby, tá Todi Jónsson spældi har.

Hagtølini frá dystinum siga, at Sogndal hevði seks upplagdar málmøguleikar, og at Viking hevði tríggjar. Mest iðra teir í Sogndal seg um, at teir vórðu snýttir fyri eitt brotsspark:

– Tommy Øren varð feldur, tá tað restaði eitt korter. Vit hildu, at tað var brotsspark, men tað helt dómarin ikki. Í sjónvarpinum sóu vit sunnukvøldið, at tað var brotsspark. Sjálvandi hevði talan verið um øðrvísi síðstu løtu, um tað høvdu havt verið vit og ikki teir, sum fyrst fingu mál.

Hetta sigur Julian Johnsson. Hann taldist ímillum teir 2.103 áskoðararnar. Skaðin, sum hann hevur drigist við í tríggjar vikur heldur honum framvegis burturi frá besta liðnum:

– Eg venji konditiónsvenjing tvær ferðir um dagin, so eg eri ikki illa fyri. Ætlanin er, at eg komandi mánadag skal fara at venja saman við hinum aftur, og so vóni eg sjálvandi, at tað skjótt verður møguleiki at koma aftur á besta liðið.

Kurt uttanfyri

Í fjør var Kurt Mørkøre so mikið sentralur á liðnum hjá Sogndal, at teir kallaðu hann Kong Kurt. Hann skoraði í so at siga hvørjum dysti. Tá var Sogndal í næstbestu deildini. Nú eru teir í bestu deildini, og tað gongst ikki so væl at skjóta mál hjá Kurt Mørkøre, sum tískil ikki sleppur at spæla so nógv

Mitt í síðstu viku spældi Sogndal í fyrsta umfarinum í steypakappingini. Dystirin var á útivølli ímóti Sør–Aurdal úr triði bestu deildini. Kurt Mørkøre var ímillum teir fyrstu ellivu. Hann spældi í ein tíma. Akkurát tá hann var farin av vøllinum skoraði Tommyu Øren til 1–0, og trettan minuttir seinni var støðan 3–0 til Sogndal. Kappingarneytarnir hjá Kurt, Alexander Ødegaard og Kurt Heggestad, skoraðu tey bæði seinnu málini.

Sunnudagin var Kurt Mørkøre á beinkinum allar 90 minuttirnar. Tað er stórt trýst á spælarunum í Sogndal í løtuni. Teir eru í dysti tvær ferðir um vikuna, og tað átti at borið við sær, at Kurt Mørkøre fekk ein nýggjan møguleika.

Sogndal skal spæla í landskappingini longu í annaðkvøld. Bæði ta ferðina og komandi sunnudag verður mótstøðan øgilig. Í annaðkvøld skulu teir spæla á útivølli ímóti Molde, sum er á tríðja plássi, og sunnudagin kemur Rosenborg úr Tróndheimi at vitja í Sogndal. Rosenborg hevur leingi verið besta fótbóltsliðið í Norðurlondum. Teir hava tapt ein dyst í ár og eru á næstfremstir. Men teir verða mettir at vera mest upplagda boðið upp á norska meistaraskapin, og undir øllum umstøðum verða teir stórur biti hjá Sogndal.

Nýtt navn í heimselituni

21 ára gamli Rustam Kasimdzhanov úr Uzbekistan hevur veruliga telvað seg inni í hitan seinasta árið við flottum kappingarsigrum. Seinasti sigur var í sterkari kapping í Týsklandi sum helst viðførir eitt ratingtal yvir 2700.

TALV

Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Gamla Sovjetsamveldið fostraði ótrúliga nógv stór talvnøvn, og ikki er hendan gongd vend síðani samveldið bleiv avtikið, als ikki.

Vit kunnu bert nevna Ruslan Ponomariov úr Ukraina, Alexander Grischuk úr russlandi og sera ungi Teimour Radjabov úr Azerbaidjan. Serliga Ponomariov og Grischuk, sum jú deildu fyrsta pláss í 3rd Tórshavn International í oktober, hava prógvað at teir saktans megna uppgávur ímóti heimselituni. Báðir eru teir 17 ár. Radjabov er við sínum 14 árum yngsti stórmeistari í heiminum, og hevur eisini víst hógv í sterkum kappingum.

Nýggja navnið í heimselituni er Rustam Kasimdzhanov úr Uzbekistan. Hann hevur verið stórmeistari í longri tíð, men tað er ikki fyrrenn í hesum seinasta árinum, at hann hevur førkað seg heilt fram í oddin.

Hann vann sterka kapping Týsklandi herfyri, nevnd 3rd Julian Borowski, framanfyri góðar menn sum Jusupow, Gurevich og aðrar stórmeistarar. Undan kappingini hevði hann styrkitalið 2693, og eftir síni fýra vunnin talv og fimm javnleikum er hann helst omanfyri 2700, og tá kann ein kalla seg telvari í heimseliituni.

Fide ratinglistin

Gary Kasparov er ikki longur tann einasti sum hevur omanfyri 2800 í rating. Vladimir Kramnik er júst dottin um gáttina til magiska talið, meðan Viswanathan Anand er beint niðanfyri.

Hesir tríggir omanfyrinevndu eru í klassa fyri seg. Teir prógva tað ferð eftir ferð í krútsterkum kappingum, og eisini er eitt glopp niður til fjórða mannin á listanum, sum er bretin Michael Adams.

Sigast skal at tiltikni Bobby Fischer enn er á listanum, sum passivur telvari, við heili 2780 í styrkitali. Hansara seinast talv var afturi í 1992 tá hann vann ein dyst ímóti Boris Spassky. Eisini annar amerikumaður, Gata Kamsky, hevur høgt tal, men hevur hann ikki leikt í eini fýra ár vegna læknaútbúgving. Ilt er at siga um hann fullkomiliga er givin.

Topp 10 (01.04.2001):

1. G. Kasparov 2827
2. V. Kramnik 2802
3. V. Anand 2794
- (B. Fischer 2780)
4. M. Adams 2750
5. A. Morozevich 2749
6. V. Ivanchuk 2731
7. P. Leko 2731
8. A. Shirov 2723
- (G. Kamsky 2717)
9. B. Gelfand 2712
10. E. Bareev 2709

Í hølunum á hesum eru eitt nú nøvn sum Topalov, Svidler og fyrrverandi heimsmeistarin Anatoly Karpov sum hevur leitað stórformin fram aftur. Á næsta topp tíggju lista verður Rustam Kasimdzhanov møguliga millum leyvirnar, hann er nevnliga væl á veg.

Sí meira um rating og annað á www.fide.com.

Talvið hesa vikuna

Dautov,R (2631) - Kasimdzhanov,R (2693)
Borowski A Essen (3), 04.05.2001

Dronningagambit
1.d4 Nf6 2.c4 e6 3.Nf3 d5 4.Nc3 Be7 5.Bf4 0-0 6.e3 Nbd7 7.c5 c6 8.Bd3 b6 9.b4 a5 10.a3 Ba6 11.0-0 Qc8 12.h3 Bxd3 13.Qxd3 Qb7 14.Rfc1 h6 15.Qc2 Rfc8 16.Rab1 axb4 17.axb4 Ra7 (svartur fær kontrol yvir a-linjuna) 18.Na4 b5 19.Nc3 Rca8 20.Nd2 Bd8 21.Nb3 Bc7 22.Bxc7 Qxc7 23.f4 (steðgar e5 gjøgnumbrotinum, men svartur finnir tó taktiskt gjøgnumbrot við næsta leikinum)



23...Ne4! 24.Nxe4 dxe4 25.Qxe4 Nf6 26.Qe5 Nd5 27.Qxc7 Rxc7 28.Ra1 Rxa1 29.Rxa1 Nxe3 30.Ra8+ Kh7 31.Nc1 Rd7 (svartur vinnur fínnu, og leikar sigurin trygt heim) 32.Nb3 Nc2 33.g3 Nxb4 34.Kf2 g5 35.Kf3 Kg6 36.Rg8+ Kf5 37.g4+ Kf6 38.fxg5+ hxg5 39.Ke4 Ra7 40.Nd2 Ra3 0-1